granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

**Reglugerð um fíggjarligan stuðul til arbeiðið við Horizon 2020 umsóknum**

Fyri best at gagnnýta avtaluna við ES um luttøku Føroya í Horizon 2020 og fyri at lætta um hjá umsøkjarum í hesi stuðulsskipan, hevur Granskingarnevndin gjørt av at játta pening úr Granskingargrunninum, ið kann veitast teimum, sum søkja stuðul úr Horizon 2020.

1) Stuðul verður veittur stovni ella virki, sum luttekur í Horizon 2020 umsókn, tá ið fleiri aðrir partar luttaka í somu umsókn.
Stuðul verður ikki veittur, tá ið talan er um einstaklinga umsókn í Horizon 2020, sum t.d. Individual Fellowship ella SME-instrument.

2) Søkjast kann um í mesta lagi 35.000 kr. fyri hvørja umsókn í Horizon 2020.
Stuðul kann verða latin til:
   - Leyskeyp/setan av fólki at skriva partar av umsókníni. Stuðulin er í mesta lagi 50% av tí lønarkostnaði, sum virkið/stovnurin hevur havt til endamálið.
   - Ferðing í sambandi við fundir og tingingar um somu umsókn.

   Útreiðslur og takstir skulu vera sambært galdandi reglum á almenna arbeiðsmarknaðinum í Føroyum og skulu kunna skjalprógvast.

3) Stuðul verður veittur sambært umsókn.
Umsóknin skal skrivast á oyðublað, sum er at finna á www.gransking.fo.
Stovns-/virkisleiðari og verkætlanarábyrgdari skulu undirskriva umsóknina.
Kravd skjalprógv eru:
   - upplýsing um, hvat útboð søkt verður í,
   - stutt lýsing av leiklutinum hjá stovninum/virkinum og
   - stutt lýsing av ætlaða netverkinum.

   Alt tilfarið skal sendast Granskingarráðnum við telduposti.

4) Umsóknarfreistin er leypandi til eingin peningur er eftir. Fráboðan um hetta verður givin á www.gransking.fo

5) Fyrisiting Granskingarráðsins tekur støðu til umsóknirnar. Svar verður latið innan 1 viku eftir, at Granskingarráðið hevur móttikið umsóknina.

6) Játtanin verður útgoldin, tá ið stovnurin/virkið hevur skjalprógvað, at umsóknin formliga er send ES umvegis Participant Portal.

Henda reglugerð kemur í staðin fyri reglugerðina viðvíkjandi FP7 umsóknum.

Tórshavn, 10. september 2014

Annika Sølvará, stjóri